Mangt er sagt um Magnus konga

Mortan Nolsøe

Í FØROYA KVÆÐUM eru prentað tvey kvæði, sum bera navnið *Margretu kvæði*. Annað er tað heldur langa sannsøgukvæðið, CCF 77, um Margretu í Norðnesi, hitt er tað nógv styttra riddarakvæðið, CCF 31, um Margretu í Nøríki.[1]) Tað er hetta seinna kvæðið, sum er evnið í heiðursgrein míni til Sverra Dahl, har setningurin er fyrst og fremst at prenta tríggjar, áður óprentaðar, tekstir av kvæðinum — sum eg nevni her við bókstøvunum *C*, *D* og *E* — og harnæst at koma við nøkrum viðmerkingum til teir og kvæðið sum heild.

C

Uppskrift, uttan nærri stað- og dagfesting, í einum handriti, nevnt *Dansispøl*, eftir Súsonnu Helenu (Sannulenu) Patursson (1864—1916), Kirkjubø. Kvæðið er nevnt í hdr. sum dømi um kvøðing til bandadans.[2])

Niðurlag:
»Burt skal eg ørindi ríða.
Hvør er nú betur Blanki ella Brúni.
Burt skal eg ørindi ríða.«
Ella:
»Nú lystir meg í dansin at gá ....«

1. Vuksu upp í ríkinum kongabørnini tvey
   Áðrenn tey kundu á gólvi ganga, bóru skarlak reyð.
2. Magnus kongur í Noregi ríkur er hann og reystur.
   Hann hevur sína onkardóttur goymd (sic) í nunnuklost(ur).[3])
3. Magnus kongur í Noregi, ríkur er hann og reystur.

Hann eigur svein í villini mørk og frúnna í nunnuklostur.
4. Tá ið hon var í klostur mánaðirnar tvá.
Lystir hon frúin Margreta sín faðirs garð at sjá.
5. Út varð loystur gangarin, fyri hallarvegg.
Prýddur var hann við skarlak niður á hóvarskógv.
6. Fram reið frúgvin Margreta, gøtan hon var breið.
Møtti henni sveinur tá, á tí somu leið.[4])
7. Hann reiv av henni stakkin og ta kápu blá.
Leiddi hana á grønan vøll sum leyvin bleiktrar á.
8. Nú havi eg fingið mín vilja fram(sic), tær til lítlan gavn.
Eg biði teg fyri tann øvarsta Gud, tú sig mær satt títt navn.
9. Magnus kongur í Noregi, hans drotning var mín móðir.
Sveinur vaks upp í villini skóg, hann var mín einans bróðir.
10. Vissum tað er av sannumið tú hevur fyri mær sagt.
Alt eru vit tá systkin(....)
11. Gakk tú aftur í klostur, í Santa Mariuborg.
Onga sigur tú nunnu frá, so væl ber tú tína sorg.
12. Far tú frúgvin Margreta aftur á klosturstein.
Onga sigur tú nunnu frá, so væl ber tú tín mein.
13. Tá reið frúgvin Margreta aftur í klosturborg.
Onga segði hon nunnu frá, so væl bar hon sína sorg.
14. Kongur letur veitslu gera, 3 á hvørjum ári.
Allar biður hann nunnurnar út av Santa-Mariu kláru.
15. So fróar ganga nunnurnar, í veitslu skuldu fara.
Uttan frúgvin Margretaið heima mátti vera.
16. Tá ið tær komu í kongins garð, í gildishallar inn.
Tá sigur Magnus kongur, hvar er dóttir mín.
17. Hvar er mín dóttir sótt og sjúk, ella hevur hon latið lív.
Hví gongur hon ikki í gildi sum onnur liljuvív.
18. Allar drýptu høvur niður, eingin tordi svara.
Uttan illa abbedissa sum væl dugdi at fara.
19. Ikki er tí(sic) dóttir sjúk, ei hevur hon latið lív.
Hon gongur sær við barni sum onnur liljuvív.
20. Vreiður var tá Magnus kong(sic), hann smelti hurð í gátt.
Tað kom honum síðst í huga at biðja góða nátt.
21. Tað kom honum fyrst í huga at seta eld á borg.

Brenna frúnna Margretu og elva henni sorg.
22. Ólavur var á skógvini burtur, blant so mangan mann.
Tá sá hann í sín faðirs garð at klostrið stóð í brand.
23. Ólavur kom av skógvini heim, bæði troyttur og móður.
Hann sló niður tað heita bál við sínum hjartablóði.
24. Fóru við illu abbidissu sum teir kundu best.
Tóku í hennara arm og bein og slitu millum hest.
25. Nú liggur illa abbidissa, henni rennur blóð.
Eingin veit um hennara hest sum loypur á villini skógv.

D

Avrit av egnari bandupptøku (*MN 1962 bd. 50*, Institutt for folkeminnevitskap, Oslo) gjørd 1962 í sitandi kvøðing eftir Jens Paula Frederik Holm (Jenis á Heyggi) (1890—1972), Hvalba, sum nevndi kvæðið *Magnus kongur í Nøríki* og metti tað at vera »millum kvæði og vísu«.[5]) Hann hevði lært tað, tá ið hann var 12—13 ára gamal av Marin Malenu á Hamri, ommu sínari í móðurætt.[6]) Annars upplýsti hann, at tað vóru mest konufólkini, sum plagdu at kvøða tað í dansi.

1. Magnus kongur í Nøríki
báði ríkur og reystur,
hann bar(?) sína onkardóttur
inn á eitt nonnuklostur.
Niðurlag
Sótum tey systkin tvey í so grønan lund
so fagurt tjaldur uttan fyri Oyrasund.[7])
2. Tá ið hon hevði í klostrinum verið
mánaðirnar tríggjar
tá lysti frúnni Margretu
sín faðirs garð at síggja.
3. Tað var frúgvin Margreta,
hon burtur á skógvin reið,
mætur var tann edilingur,
ið henni møtti á leið.
4. Hann reiv av henni stakkin,

hann reiv av henni geira,
gullband um hennara herðar lá,
hon hevði ikki eftir meira.

5. Hann reiv av henni stakkin,
hennara silkiserk,
til hann hevði vunnið henni
tað ónda neisisverk.

6. »Nú hevur tú rivið míni klæðir sundur,
gert mær báði last og skamm,
eg biði teg fyri tann øvarsta Gud,
tú sig mær nú títt navn.«

7. »Magnus kongur er faðir mín,
Álvhild hæt mín móðir,
Ólavur eri eg á navninum nevndur,
voksin upp á skógir(sic).«

8. »Var Magnus kongur faðir tín,
Og Alvhild(sic) hæt tín móðir,
undarlig so eru dømini,
so ert tú mín egin bróðir.«

9. Kongurin, hann letur veitslu gera
eina á hvørjum heysti,
hann býður øllum nonnunum
út av Mariu klostur.

10. Glaðar vóru tær nonnurnar,
í gildi skuldu fara,
uttan hon frúgvin Margreta,
hon mátti heima vera.

11. Glaðar vóru nonnurnar,
í gildi gingu inn,
reystur situr Magnus kongur,
hann saknaði dóttur sína.

12. »Hvar er mín dóttir av sóttum sjúk,
ella hevur hon látið lív,
hví kemur hon ei í gildi í dag
sum onnur lystig vív?«

13. Allar drýptu høvdið niður,

eingin tordi at tala
uttan hin gamla abbadissin,
hon komst ikki við at svara.

14. »Ei er tín dóttir av sóttum sjúk,
ei hevur hon látið lív,
hon gongur sær við barninum
sum onnur lystig vív.«

15. Eingin hestur í ríkinum
kongin bera mátti
uttan hin gamli abbaldagrái,
ið abbadissan átti.

16. Tað var reysti Magnus kongur,
hann heim í garðin fór,
úti frúgvin Margreta
í fyri honum stóð.

17. »Ver vælkomin Magnus kongur
higar nú til mín,
tú drekk nú, hvat ið tær betri líkar,
mjøðin ella vín.«

18. »Lítið er mær um mjøðin tín
alvæl minni um vín,
tú sig mær skjótt og skundiliga
barnafaðir tín.«

19. »Fyrr skal eg í Jesu navn
láta mítt lív,
heldur enn eg skal siga tær
barnafaðir mín.«

20. Tað var reysti Magnus kongur,
hann smelti hurð í gátt,
tað kom honum síðst í hug
at biðja góða nátt.

21. Tá ið hann hevði riðið
eina so lítla leið,
tá kom honum tað í huga
at leggja eld í stein.

22. Tá kom tá honum tað í hug

at leggja eld í stein,
brenna so inni Margretu,
tí hon var heima eina.

23. Ólavur kom av skógnum heim
við so mangan mann,
hann sá í sín faðirs garð,
at klostrusteinur brann.[8])

24. Ólavur kom av skógnum heim
báði troyttur og móður,
sløkkir hann tann hin heita eld
við sínum hjartablóði.

25. Tóku teir bæði systkini,
sveipaðu í ein dúk,
vísir gingu teirra vegir
til himmalskongin út.

E

Uppskrift gjørd 1979 av Kjartan Nielsen, Fámjin, eftir faðir sín Niels Jacob Nielsen (N. J. í Trøðum) (1893—1980), Fámjin, sum hevði lært kvæðið av fleiri, eitt nú abba sínum Thomas Jacob Jacobsen (Tummas í Trøðum) (1832—1913), Fámjin.[9])

Margretu kvæði — Margretu vísa ella Margretu kvæði

1. Lurtið eftir *kvæði* mínum — kvæðinum
meðan eg gangi í dans
eg kvøði um Magnus *konga* av Nøríki — kong
og Margretu dóttur hans.[10])
Niðurlag:
Sótum tey systkin tvey
í tann grønu lund
so fagurt tjald
uttan fyri Oyrasund.

2. Magnus kongur av Nøríki
bæði ríkur og reystur — báði
hann letur sína *einkardóttur* — onkardóttur
inn *í* Mariu klostur. — á

3. Tá ið hon hevði í klostri verið	
mánaðarnar tríggjar	mánaðirnar
tá *lysti* frúnni Margretu	lystir
sín faðirs garð at síggja.	
4. Tá ið hon hevði riðið	
eina so stutta stund	
mætur var tann edilingur	
ið henni møtti í lund.	÷
5. Hann tók hana av hesti niður	
hann mundi á hana herja.	ætlaði
hon var væl av evnum borin	men hon mátti seg
ætlaði seg væl at verja.	so manniliga
6. Hann *reiv henni klæðir*	nektaði av henni klæðini
hartil silkiserk	umframt
til hann hevði vunnið henni	
tað synda *neisinsverk.*	neisisverk
7. Hoyr tú tað tú vakra fljóð	
siga skal tú mær	
bæði skjótt og skundisliga	báði
hvør er faðir at tær.	
8. Eg kann ikki sannari	
siga fyri tær	
Magnus kongur av Nøríki	
er *sanni* faðir at mær.	sannur
9. Magnus kongur er faðir at mær	
og Hjørdis er mín móðir	frú Hjørdis
Ólavur eitur bróðir mín	
og hann vaks upp á *skógi.*	skógum
10. Er Magnus kongur *faðir tín*	faðir at tær
og Hjørdis tín móðir	frú Hjørdis er
eg veit ikki sannari at siga tær	
eg eri tín egin bróðir.	
11. Hoyr tú Margreta systir mín	
eg gevi tær tey ráð	
far tú tær í klostrið aftur	
og ongum sig tú frá.	

12. Magnus kongur í Nøríki	
bæði ríkur og reystur	báði
hann letur eina veitslu gera	
har á hvørjum heysti.	
13. Hann letur eina veitslu gera	
har á hvørjum heysti	
býður so øllum nunnunum	hann bjóðar
inn *á Mariu klostur.*	av Mariu klostri
14. Glaðar vóru nunnurnar	
sum skuldu í gildi inn	
uttan frúgvin Margreta	
hon bar bleikan kinn.	
15. Glaðar vóru nunnurnar	
í gildi skuldu fara	
uttan frúgvin Margreta	
hon mátti heima vera.	
16. Glaðar vóru nunnurnar	
í gildi gingu inn	sum í
ríkur situr Magnus kongur	
og saknar dóttur sín.	
17. Hvat er mín dóttir av sótt *ella* sjúk	(?)illa
ella hevur hon *latið* lív	látið
hví kemur hon ikki í gildi í dag	
sum *eitt* annað lystigt vív.	÷
18. Allar drýptu høvdið niður	
eingin tordi *mæla*	tala
uttan hin *illa* abbadissa	fræga
henni stóðst ikki við at svara.	hon stóð seg
19. *Ei* er tín dóttir av sótt *ella* sjúk	Ikki (?)illa
ella *latið* lív	hevur hon látið
hon *gongur* sær við barninum	gengur
sum *eitt* annað lystigt vív.	÷
20. *Ei* er tín dóttir av sótt *ella* sjúk	Ikki (?)illa
ella *givið* upp ond	hevur hon givið
hon *letur seg við barni ganga*	gengur sær við barninum
sum eitt annað liljuvond.	

21. Tað var *reystur* Magnus kongur	reysti
hann *letur* hurð í gátt	smekkar
tá kom honum tað í huga	
at brenna hana inni á nátt.	
22. Tá kom honum tað í huga	
at leggja eld *við* stein	í
og brenna inni Margretu	÷
meðan hon var eina heim.	
23. *Men* eingin hestur í ríkinum	÷
kongin bera mátti	
uttan hin illi abbaldagrái	
sum abbadissan átti.	
24. Kongurin ríður skundisliga	
til Mariu klostur inn	
sig mær skjótt og skundisliga	
barnafaðir tín.	
25. Hoyr tað Margreta dóttir mín	
hvat eg sigi tær	
sig mær skjótt og skundisliga	
hvør barnafaðir tín er.	
26. Fyrr *vil eg í Jesus* navn	skal eg í Jesu
lata mítt lív	láta
fyrr enn eg *vil* siga tær	fari at
barnafaðir mín.	
27. Tað var *reystur* Magnus kongur	reysti
hann *letur hurð* í gátt	legði eld
setur eld á Mariu klostur	hann brendi inni Margretu
á *teirri* somu nátt.	tí
28. Magnus kongur frá klostri reið	
aftur til nunnugildi	
hann angraði sína ringu gerð	
so leingi sum hann livdi.	
29. Ólavur var á skógnum burtur	
framdi list og leik	
tá hann sá tann stóra eld	
hann gjørdist í kinnum bleik.	

30. Ólavur gjørdist í kinnum bleik
tá hann sá eldin reyða
hatta man vera Margreta systir mín
teir ætla at brenna til deyða.

31. Ólavur *kom av skógnum heim* — kemur av skógnum heim
bæði troyttur og móður — báði
eg skal sløkkja tann heita eld — hann vildi
við *mínum* hjartablóði. — sínum

32. Ólavur reið móti klostrinum
sínum hesti vendi
so leyp hann í eldin inn
og tað var hansara endi.

33. Nunnurnar í gildi vóru
skuldu ríða heim
tá tær til klostrið komu
tá var tað brent í eim.

34. Tá tær til klostrið komu
var tað brent í øsku
har lá Ólavur kongsins son
og Margreta hans systir.

35. Mangt er sagt um Magnus konga
ímeðan hann mundi liva
at hann læt brenna Mariu klostur
tað finnist ikki skrivað.

— — —

Tekstirnir, sum eru prentaðir í FØROYA KVÆÐUM av kvæði okkara, eru tveir, nevndir *A* og *B*, sum hava ávikavist 34 og 38 xaya ørindi + niðurlag.[12])

A-teksturin byggir á eina uppskrift, sum V. U. Hammershaimb gjørdi 1848 suðuri í Vági eftir hina 43 ára gomlu Birte Sofie Jacobsdatter (Biritu á Mýri) (1805—1874), og er navnið á kvæðinum skrivað *Magnus kongur í Noregi.*[13]) Hesa uppskrift læt Hammershaimb prenta í *FK I—II* (1851—55) í broyttum líki, ikki bara málsliga, men ør. 29 í henni er burturúrlagt, og niðurlagið er eitt annað.[14]) Tað er tíverri teksturin í *FK I—II*, sum er prentaður við fáum broytingum í FØROYA KVÆÐUM. Hammershaimb skrivaði

eisini onnur kvæði upp eftir Biritu á Mýri, sum var gift við Jógvani á Mýri, men var dóttir Jákup í Toftum, Rádni Bóndi kallaður.[15]) Nevnast kann at Birita á Mýri var systir Joen Jacob Jacobsen, vanliga nevndur Jógvan í Lopra, sum giftist 1835 við Julionnu Sofíu Pálsdóttur úr Kirkjubø, ið var abbasystir at Sannulenu Paturson.[16]) Av hesum kundi tað hugsast at verið beinleiðis keldusamband millum *A*- og *C*-tekstin av kvæði okkara, men munurin teirra millum er somikið stórur, at kvæðið er valla komið til Kirkjubøar frá umhvørvinum hjá *A*-tekstinum. Av øllum teimum 5 avbrigdunum, ið eru til av kvæði okkara, stendur *A*-teksturin næst *D*-tekstinum úr Hvalba, meðan *C*-teksturin nærkast meira *B*-tekstinum.

B-tekstin av kvæði okkara skrivaði Jakob Jakobsen, doktari, 1904 í Sumba eftir Cathrine Malene Symphor f. Jakobsen (Katrinu á Gøtuni) (1862—1942).[17]) Katrina var gift til Sumbiar, men var fødd í Fámjin og pápasystir at heimildarmanninum at *E*-teksti okkara.[18]) Tað er tí mest líkt til, at hon, eins og hann, hevur lært kvæðið í Fámjin, og tað er heldur eingin ivi í, at tekstirnir hjá teimum hoyra nærri saman enn hinar uppskriftirnar av kvæði okkara. Kortini er tað ein munur millum báðar tekstir bæði viðvíkjandi einstøkum ørindum og niðurlagi, sum reisir spurningin, um bæði hava lært kvæðið av somu(m) heimild(um) har. Av tí at hann, og óivað eisini hon, hevur lært kvæðið ikki eftir bók (uppskrift), men *í tungulist*, kann munurin hinvegin eisini fyri ein part verða mettur sum úrslit av fyribrigdinum »oral composition«.[19])

— — —

Kvæði okkara er til eisini í Íslandi, har tað ber m. a. navnið *Margrétar kvæði* (sí ÍFkv 14) og er varðveitt i 3 avbrigdum, sum eru savnað ávikavist í 17., 18. og 19. øld.[20]) Hin íslendski kvæðagranskarin Vésteinn Ólason hevur ta áskoðan, at kvæðið er komið til Íslands úr Føroyum, og hann hevur í hesum sambandi víst á, at tann elsta íslendska uppskriftin stendur *B*-teksti okkara serliga nær. Um líkskapin millum báðar tekstir sigur hann annars: »Petta er í sjálfu sér merkilegt dæmi um stöðugleika hinnar munnlegu geymdar í báðum löndum og þó einkum í Færeyjum þar sem kvæðið hefur varðveist svo miklu lengur«.[21]) Tó at kvæðið ikki er kent aðrastaðni, finna vit høvuðsmotivið í tí, t. e. *blóðskemd millum systkin*,

aftur í fleiri øðrum balladutýpum í Norðurlondum (sí TSB D 86—96 *Incest motifs*) og í Bretlandi (sbr. t. d. Child nr. 50 *The Bonny Hind* og nr. 52 *The King's Dochter Lady Jean*).[22])

— — —

Sum vant við skaldskapi av manna munni er kvæði okkara eyðkent av ymiskum broytingum, sum tó oftast halda seg innan fyri tann episka karmin hjá kvæðinum sum balladutýpu. Í *C*- og *E*-tekstunum finna vit kortini dømi um størri broytingar. Í báðum førum snúgva tær seg um leiklutin hjá Magnusi kongi í sambandi við, at Margreta varð innibrend, fyri at dómurin yvir hann kann verða mildari. Í *C*-tekstinum verður hetta gjørt við at lata ta illu abbadissuna revsa *til deyða*, tí hon segði konginum frá, at dóttirin var við barn, og lænti honum hestin til at fremja illgerðina. Í *E*-tekstinum er *seinasta ørindið* (35) enntá vorðið til *eitt opið mótmæli*, at nakað álítandi prógv er til um illgerð hansara, tó at hetta mótsigur á ørkymlandi hátt tí, sum beint undan er sagt um leiklut hansara. Hvussu henda mótsøgn, sum mær vitandi er eindømi í føroyskum kvæðum, skal skiljast, er ein spurdómur, uttan tað at ørindið man óivað vera *seinni uppíyrking*. Ein gáta fyri seg er, at heimildarmaðurin (NJN) segði seg minnast ørindið serliga av einum tilburði, har pápasystir hansara í Sumba hevði havt tað á munni, tó at tað er *ikki* at finna í *B*-teksti hennara í FØROYA KVÆÐUM[11-12]). Eyðvitað er tað møguligt, at hon hevur gloymt ørindið av misgáu, men eg meti tað vera sannlíkari, at hon hevur lagt tað burturúr við vilja tí henni varð greitt, at tað var *eitt leyst ískoyti*, sum ikki skuldi takast fyri fult. Niðurstøða mín er tí, at hetta ískoytið, sum: *ger kvæðið til einkis* (NJN), hevur upphavliga havt virki (funktión) sum eitt *argingarørindi*, helst tá ið kvæðið varð kvøðið á gólvi.[23])

VIÐMERKINGAR

[1]) Í Grundtvig & Bloch FØROYA KVÆÐI (útg hjá CM & ND) eru tekstirnir prentaðir soleiðis: CCF 77, tátturin *Frúgvin Margreta*, í 3. b. (Kbh. 1945), bls. 189—197, 200—209, 212—220, og *CCF 31* í 1. b. (Kbh. 1951—63), bls. 650—653. Í Jonsson, Solheim, Danielson THE TYPES OF THE SCANDINAVIAN MEDIEVAL BALLAD (Sth. Oslo etc. 1978), seinni stytt TSB, er tað fyrra kvæðið (tátturin) skipað sum *TSB C 22 Frúgvin Margreta — The Nor-*

wegian princess Margreta burnt at the stake in 1301 og tað seinna kvæðið sum *TSB D 94 Margrétar kvæði — Sister raped by brother is punished by father* (sí bls. 69 og 101—102). — Kvæði okkara (CCF 31) er fyrstu ferð nevnt við navni í kvæðaskránni hjá Schrøter (sí H. C. Lyngbye FÆRØISKE QVÆDER, 1822, inngangin bls. 19 nr. 132), har tað eitur *Magnus kongur í Nørigji* (sbr. eisini viðm. 5).

[2]) Sámal Patursson, Kirkjubø, eigur handritið, sum Føroyamálsdeildin í 1974 fekk tikið ljósrit av. Í hdr. eru ørindini tvíreglað, fyrra regla endar við punktum, og seinna byrjar við stórum bókstavi. Stavsetingina í hdr., men ikki teknsetingina, havi eg lagað eftir galdandi rættskriving. Viðv. ævisøguligum upplýsingum um SHP vísi eg til greinina hjá Sigrið av Skarði Joensen *Súsanna Helena Patursson*, pr. í KVINNUTÍÐINDUM, 1953 nr. 2, bls. 1—6, sum Jóhan Hendrik W. Poulsen hevur gjørt so væl at vísa mær á.

[3]) Ørindini í tekstinum eru talmerkt av mær, soleiðis sum tey koma hvørt eftir annað í hdr. undantikið hetta eina ørindið (2), sum stendur fyri seg sjálvt. Her upplýsir hdr. kortini: *Annað ørindið er* Magnus kongur í Noregi (....). — Endin á orðinum *nunnuklost(ur)*, ið stendur ytst á breddanum í hdr., er ótýðiligur og er tí av mær settur í klombur ( ).

[4]) Rímorðini eru í hdr. skrivað *breyð*(sic) og *leið*.

[5]) Ein frágreiðing um savningarferð mína í Føroyum 1962 er prentað í ARV, vol. 18—19, 1962—63, bls. 396—402, har kvæðið er nevnt bls. 398 undir CCF 31 sum *Magnus kongur í Noregi*, t. e. við somu stavseting sum í FØROYA KVÆÐUM, tó at navnið eftir framburðinum hjá heimildarmanninum og annars í Suðuroynni á okkara døgum skuldi av røttum verið skrivað *Magnus kongur í Nøríki* (sbr. viðm. 1). Normaliseringin av navninum í FØROYA KVÆÐUM stavar frá V. U. Hammershaimb.

[6]) Omman, Maren Malene Niclasen f. Mørch (1839—1921), var gift við Jens Paula Niclasen (Jenis á Hamri), Hvalba. Heimildarmaður mín (JH) og beiggi hansara, Mortan á Fløttinum (MH), sum eisini kvað fyri mær í 1962, vistu at greiða frá, at omman á Hamri hevði kvøðið fyri Hjalmar Thuren »inn í eitt rør«, t. e. á fonograf. Hetta samsvarar eisini við bók hansara FOLKESANGEN PAA FÆRØERNE (Kbh. 1908, bls. 80 og 133), har hon er nevnd sum Maren Malene Niklasen og er at finna millum heimildarfólk hansara.

[7]) Heimildarmaðurin (JH) kvað niðurlagið gjøgnum alt kvæðið, og beiggi hansara (MH) hjálpti til at kvøða tað, men hann kvað tað eitt sindur øðrvísi: Sótum tey systkin tvey í *tann grøna* lund (....). Báðir frambóru *fagurt* í niðurlagnum sum fæagurt, t. e. við lesiframburði, tó at kvæðið varð kvøðið eftir minni. Tó at heimildarmaðurin (JH) byrjaði ørindini ofta við *Og*, havi eg lagt hetta burturúr her, eins og Sophus Bugge hevur gjørt í tekstunum í GAMLE NORSKE FOLKEVISER (Kra 1858, bls. V, viðm. á breddanum í neðra).

[8]) Heimildarmaðurin kvað hetta ørindið tvær ferðir við sama orðaljóði.

[9]) Savningin av kvæðinum byrjaði, tá ið eg á savningarferð í Fámjin 8.—9. apríl 1979 treiv í eitt ørindi av kvæðinum, og NJN loftaði tí beinanvegin,

soleiðis at tá ið eg hevði sagt ikki meira enn fyrru helvt, segði hann seinnu helvt (ør. 2). Dagin eftir (9.4.) tók eg upp á band 25 ørindi, sum hann hevði mint seg á og segði fram fyri mær. Við tað at hann visti, at fleiri ørindi vóru eftir, bað eg hann fáa sonin Kjartan til at skriva tey upp, so hvørt sum hann kundi minnast tey. Tá ið eg ringdi til NJN 18.4.1979, dugdi hann fleiri ørindi, og fekk eg hann til at siga tey øll (29 í tali), samstundis sum eg tók tey upp á band. Uppskriftina, sum eg havi prentað her, handaði NJN mær í Fámjin 10.8.1979, men hann viðmerkti, at tvey ørindi vóru eftir, sum hann ikki var førur at minnast. Tey komu aftaná, tá ið Magnus kongur reið heim frá eldinum, segði hann. Avbrigdini, sum eru prentað høgrumegin uppskriftina, eru tikin úr upptøkuni av kvæðinum 18.4. fyri at vísa nakað av muninum millum báðar tekstir, tí eg havi ikki høvi her at prenta seinna tekstin í heilum líki. Tá ið eg hevði fingið uppskriftina 10.8., læt eg NJN fáa eitt eintak av *B*-tekstinum fyri at taka støðu til hann, men seinni í upptøku við hann 22.10.1979 segði hann seg ongar viðmerkingar at hava til hann. — NJN upplýsti, at hann hevði hoyrt kvæðið bæði sum óviti og ungur í Fámjin frá fleiri, mest í sitandi kvøðing, sjáldan á gólvi. Sjálvan segði hann seg ongantíð hava skipað tað á gólvi, men at hann hevði onkuntíð kvøðið tað t. d. á skipsvakt millum londini. Umframt abba sín í Trøðum hevði NJN hoyrt hesi fólk í Fámjin kvøða kvæðið: pápasystrina Mariu undir Rygginum (Maria Fredrikke Nielsen f. Jakobsen, Fámjin, 1875—1927) fleiri ferðir, Petur í Horni (Jacob Peter Ludvig, Fámjin, 1854—1939, sum var giftur við Súsannu, einari aðrari pápasystur hjá NJN) og Palla yviri í Garði (Joen Pauli Albinus, Fámjin, 1850—1922).

[10]) Fyrsta ørindið segði NJN seg hava bara frá Petur í Horni, sum altíð byrjaði kvæðið við tí, meðan hini heimildarfólkini byrjaðu tað við ørindi 2.

[11]) Um seinasta ørindi (ør. 35) upplýsti NJN, at hann kundi minnast tað serliga av einum tilburði í Lopra, har pápasystir hansara, Katrina á Gøtuni, hevði havt tað á munni við nevnda Petur í Horni fyri at bera í bøtuflaka fyri ein mann, sum ikki var hjástaddur.

[12]) Tó at eg havi havt høvi at samanbera bæði *A*- og *B*-tekstin í FØROYA KVÆÐUM við uppskriftirnar hjá Hammershaimb og Jakob Jakobsen (t. e. AM, Access. 4 og Savn dr. Jakobsens 1904, Føroya Landsbókasavn), havi eg tíverri ikki greinarrúmd til at viðgera allan munin millum prenttekstirnar og uppskriftirnar.

[13]) Tó at Hammershaimb hevur í uppskrift sínari úr Vági skrivað navnið á kvæðinum soleiðis, meti eg normaliseringina hjá honum at vera misvísandi í mun til framburðin (sbr. omanfyri viðm. 1 og 5).

[14]) Í FÆRØISKE KVÆDER I—II (Kbh. 1851—55), stytt FK I—II, er kvæðið prentað í II. b. bls. 165—167. Í uppskrift hansara ljóðar ør. 29 soleiðis: *Tá ið hann hevði riðið / eina so lítla tíð / tá kom honum tað í huga / at leggja eld í líð* og niðurlagið: *Oman eftir og niðan eftir / omaneftir vallaratúni — / hvar fór hestur mín hin brúni. / Omaneftir vallaratúni* (skrástrikurnar eru mínar).

[15]) Umfram CCF 31 hevur Birita kvøðið fyri Hammershaimb: CCF 23 A, 44 B, 109 D, 156 A og 188 (sbr. Grundtvig & Bloch FØROYJA KVÆÐI (hdr.), 1. b., bls. CVII í *Alfabetisk kilderegister*). Viðv. ævisøguligum upplýsingum um Biritu á Mýri vísi eg til Poul Andreasen ÚR VÁGS SØGU (Vági 1977 bls. 100).

[16]) Sbr. Poul Andreasen op. cit., bls. 228.

[17]) Nevnast kann at í søvnunum hjá Jakob Jakobsen er til ein onnur, óprentað, uppskrift eftir Katrinu á Gøtuni av CCF 124 *Faðir og dóttir*.

[18]) Katrina og pápi NJN, Poul Johannes Nielsen (Pól í Trøðum), vóru hálvsystkin. Tey høvdu somu mammu, Annu Elisabeth Jacobsdatter, sum var fødd 1831 í Hvalbiar sókn og giftist til Fámjins.

[19]) Viðv. hugtakinum *oral composition* og nýtslu tess í sambandi við balladuyrking sí t. d. David Buchan THE BALLAD AND THE FOLK (London & Boston 1972, bls. 51—61, Chapter 6 *Balladry and Oral Poetry*) og Wayne A. O'Neil *The oral-formulaic structure of the Faroese kvæði*, pr. í FRÓÐSKAPARRITUM 18. bók (1970), bls. 59—68. — Avbrigdini, sum eru prentað høgrumegin *E*-tekst okkara, kunnu samanberast bæði við nevnda fyribrigdi ella tað, sum eg havi nevnt *valfríar formar* í sambandi við eitt annað kvæði eftir NJN, Fámjin, sí grein mína *Várharra tekur í Jákupsa hond*, pr. í SJØTÍU RITGERÐIR HELGAÐAR JAKOBI BENEDIKTSSYNI 20. JÚLI 1977 (Rkv. 1977, seinni partur, bls. 600—608).

[20]) Viðv. tekstunum av kvæðinum sí ÍSLENZK FORNKVÆÐI (....) udgivet af Jón Helgason: I (Kbh. 1962, bls. 98—105), V (Kbh. 1965, bls. 63—69) og VII (Kbh. 1970, bls. 94—95) (= EDITIONES ARNAMAGNÆANÆ SERIES B, vols 10, 14 & 16).

[21]) Sí grein hansara *Eitt er frøðið úr Føroyum komið*, pr. í BÓKATÍÐINDUM (frá Bókagarði), 7. árg., Nr. 1, november 1978, bls. 77—80, og bók hansara SAGNADANSAR (Rkv. 1979, bls. 376).

[22]) Sí TSB, bls. 100—102, Francis James Child THE ENGLISH AND SCOTTISH POPULAR BALLADS (útg. Dover Publications, N. Y. 1965), vol. I, bls. 444—447 og 450—454, og Poul G. Brewster *The Incest Theme in Folksong* (Helsinki 1972, bls. 15—16) (= FF COMMUNICATIONS No. 212).

[23]) Tá ør. 35 varð kvøðið á fyrsta sinni, kundi eg hugsað mær tilgongdina at hava verið hesa: Tá skiparin hevði kvøðið kvæði sítt at enda, hevur onkur hjástaddur beinanvegin kvøðið og kanska yrkt á gólvi ørindið afturat, helst meira fyri arga skiparan og dansifólkið enn at gera kvæðið sjálvt til einkis. — Sum eitt slag av meira góðsligari arging kann ein meta dømi um avbronglaða kvøðing, sum ein kann hoyra av niðurløgum í dansi, eitt nú: Grani *kom fullur* av heiði (fyri: Grani *bar gullið* av heiði), ella: Dansið væl í *stivlum* (fyri: Dansið væl í *stillum*).

Upplýsingar um nøvn og árstøl í greinini viðvíkjandi persónum úr Suðuroy havi eg fingið — umframt frá fólkateljingum á Landsskjalasavninum — frá sóknarprestunum Elsu Funding, Hvalba, Johan Weihe, Tvøroyri, og Bjarna Bæk,

Vági. Teimum og somuleiðis Patriciu Conroy, University of Washington, fyri at hon gjørdi so væl at lesa greinarhandritið og at koma við viðmerkingum og rættingum til tað, takki eg fyri holla hjálp.

SUMMARY

Among the Faroese ballads printed in CORPUS CARMINUM FÆROENSIUM, type 31 Margretu kvæði, or Magnus kongur í Noregi, is represented by two variants (A, B), both from the island of Suðuroy. The ballad was also recorded in Iceland as early as the 17th century (cf ÍFkv 14 and TSB D 94 *Margrétar kvæði — Sister raped by brother is punished by father*). However, even though it was first recorded in Iceland, the Icelandic ballad scholar Vésteinn Ólason believes it to be originally from the Faroes. In my paper another three Faroese variants (*C*, *D*, and *E*) are published for the first time. Variant C was found in a MS from the village Kirkjubøur on the island of Streymoy, while *D* and *E* were recorded on Suðuroy. Of special interest is the last stanza (35) of variant *E* because it declares the foregoing ballad story as false. The aim of this paper is (1) to publish the new variants together with some information and comments about them and the already printed variants, (2) to say something about the relationship among the five Faroese variants, and (3) to explain the nature of the above-mentioned last stanza of the E-text. In my opinion, it represents a secondary element of fairly recent date, created probably in the context of the dance by a competing or jesting participant more to tease the ballad performer (Far. *skipari*) than to discredit the ballad itself.